## Prestar vita ov lítið

Tað ljóðar kanska løgið, men sambært Kristeligt Dagblad vita danskir prestar so lítið um guðstænastur og sálmar, at heili 80 prosent av prestunum halda, at teir eiga at fáa eftirútbúgving. Ein spurnarkanning vísir, at tað eru serliga teir ungu prestarnir, sum halda seg hava tørv á eftirútbúgving. Rektarin á prestaskúlanum í Århus, Henning Thomsen, heldur, at útbúgvingin er ov stutt. Hon eigur at taka tvær ferðir so langa tíð sum nú, heldur hann.

## Kapping ella alment

Stjórin í Landsverki, Oyvindur Brimnes, ivast í, um tað er rætt at geva partafelagnum Skálafjarðartunnilin loyvi til at gera tunnilin millum Havnina og Skálafjørðin. Við Útvarpið sigur hann, at skal arbeiðið vera privat, eiga fleiri at fáa møguleikan at bjóða seg fram. Løgfrøðingurin Bjørn á Heygum segði í síðstu viku, at eftir hansara tykki eiga politikararnir at umhugsa at stovna eitt alment partafelag til at gera tann ætlaða tunnilin.

# - Íslendskar kvinnur elska Jógvan

**Fríggjakvøldið sang Jógvan Hansen seg víðari í íslendsku tónleikakappingini X-Factor,. Sambært heimildarmanni okkara Jens Guð fara atkvøður frá forelskaðum kvinnum at tryggja víðari luttøkuna hjá Jógvani í sendingini.**


*Jógvan Hansen er til dagligt hárskeri í Reykjavík, men nú er hann eisini vorðin superstjørna*
*Mynd: Dávur Winther*

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

- Íslendskar kvinnur elska Jógvan, hann er vorðin ein av størstu poppstjørnunum her. Eg vænti, at somikið nógvar íslendskar kvinnur eru forelskaðar í Jógvan, at hann skuldi verið tryggur eisini í komandi umfari. Orðini eigur Føroyavinurin, Jens Guð, ið aftur fríggjakvøldið í íslendskum sjónvarpi sá Jógvan Hansen syngja seg víðari í kappingini X-Factor.

Jógvan er ein av 9 luttakarum, ið eru eftir í sendingini, ið er best umtókta sjónvarpssending nakrantíð í Íslandi. Áskoðararnir atkvøða við sms-atkvøðum, og síðan velur dómsnevndin millum tey, ið fáa fæstar atkvøður. Jens Guð greiðir frá, at í sendingini fríggjadagin vóru tríggir sangarar í vandabólkinum og Jógvan taldist ikki ímillum teirra. Áður hevur Jens Guð mett, at Jógvan fór at vera í vanda fyri at verða sendur heim skjótt, tí hann ikki hevur sama íslendska bakland, ið atkvøður fyri honum, sum fleiri av hinum luttakarunum hava. Men nú er vent í holuni og Jens Guð væntar, at atkvøður frá forelskaðum kvinnum eru neyðuga baklandið.

Jógvan sang fríggjakvøldið 80'ára lagið Dancing In The Moonlight hjá Toploader og gjørdi hetta sera sannførandi.

Fyrrverandi Aria og Kularrøtur sangarin er vorðið eitt sera kent navn í Íslandi eftir, at nakrar vinkonur meldaðu hann til stóru sangkappingina. Í farnu viku hevði Fréttablaðið stóra grein um vælumtókta klaksvíkingin, ið sambært Jens Guð er nýggjasta føroyska superstjørnan í Íslandi.

- Fólk eru farin at spyrja. um einki mark er fyri, hvussu nógvar góðar sangarar Føroyar megnar at fostra. Eivør er longu eitt av størstu tónleikanøvnunum her, og onnur nøvn sum Høgni Lisberg, Lena Andersen, Brandur Enni, Týr, 200, Makrel og Deja Vu hava verið nógv spæld í Íslandi. Við 48.000 íbúgvum tykjast føroyingar at hava eins nógvar góðar sangarar, sum Ísland hevur við sínum 307.000 íbúgvum, og hetta má sigast at vera flott, greiðir Jens Guð frá.

Hann sigur seg gleða seg til 31. mars, tá AME aftur vitjar í Reykjavík. Tí áhugin fyri føroyskum tónleiki er sera stórur.

# Grand prix post Lordi

**Ein maður í kjóla vísti vegin, tá danska melodi grand prix veitslan kom til Horsens leygarkvøldið. Væl bakkaður upp av góðum dansi frá føroysku Vígdis Hentze Olsen. Grand Prixið verður kanska ongantíð tað sama aftur.**

GRAND PRIX
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið tosað um, at sigurin hjá Lordi í Eurovision finaluni í fjør, fór at beina fyri Grand Prixnum, sum vit kenna tað. Leygarkvøldið var danska finalan í Grand Prixnum og hóast fyrireikarar og stirvnir dómarar gjørdu alt fyri at halda fast í tí siðbunda Melodi Grand Prix slagaranum, so vildu áskoðararnir tað øðrvísi og vinnarin gjørdist frískligasta innslagið á kvøldinum. Ein drag queen, ið rópti seg DQ við eini fangandi popp bumbu, ið hann kallaði Drama Queen.

Peter Andersen í kjóla og glimmur vann danska Melodi Grand Prixið frammanfyri nógvum túsund áskoðarum í Horsens og milliónum av hyggjarum kring Danmark og í Føroyum.

Lagið Drama Queen breyt frá øllum á kvøldinum, tí tað skerst ikki burtur, at hóast fólk hava tosað um eina Lordi-effekt og at Grand Prixið ongantíð fór at verða tað sama aftur, so høvdu fyrireikararnir av Grand Prixnum í eini ráskiljing og tveimum hálvfinalum. fingið kóka tey 500 innsendu løgini niður til eitt bland av heilt vanligari og sera óspennandi grand prix salat. Lagið var vorðið ov stutt í hálvfinaluni, men slapp at royna seg aftur í útvarpinum í kapping við onnur vrakaði løg um eitt sonevnt Wild Card, og lurtararnir hjá best umtóktu útvarpsstøðini í Danmark, P3 valdu at atkvøða Drama Queen inn aftur í Grand Prixið, sum eitt Wild Card.


*DQ sannførdi við eini stórari Grand Prix veitslu m.a. saman við føroysku Vígdis Hentze Olsen.*
*Mynd: Scanpix.dk*

Í framførsluni hevði DQ ella Peter Andersen okkurt eyka, har var lív í og festligt og ein herlig sjálvsironi, ið klæðir Grand Prixnum. At øll ikki eru samd í, at sjálvsironi er rætta leiðin var prógva við, at danski soul favoritturin James Sampson og tann minst sjálvironiski av øllum, Stig Rossen endaðu á ávíkavist 2. og 3. plássi.

Føroyska Vígdis Hentze Olsen hevði ein stóran leiklut í sendingini og dansaði saman við fleiri øðrum bæði í byrjanini og undir framførslunum hjá nógvum tónleikarum, m.a. vinnarunum. Um Vígdis sleppur við til Finnlands er enn ikki greitt.